Shellstøðin í Trongisvági:

# Umboð hjá Reyni Service og Auto Service

**Reyni Service og Auto Service, sum umboða tilsamans sjey ymisk bilmerkir, hava gjørt samstarvsavtalu við Shellstøðina í Trongisvági um eftirlit og smærri umvælingar av teirra bilmerkjum í Suðuroy**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Frá 1. oktober 2006 hava bilfyritøkurnar Reyni Service og Auto Service gjørt samstarvsavtalu við Shellstøðina í Trongisvági um eftirlit og smærri umvælingar av teirra bilmerkjum í Suðuroy.

Jákup Midjord í Hvalba, sum herfyri keypti ognina frá Mogens Petersen, sigur, at tey eisini koma at liggja inni við tilfari sum t.d. brochurum, prísum og øðrum í hesum sambandi.

Eivind av Reyni stjóri hjá Reyni Service, sigur, at avtalan við Jákup Midjord og Shellstøðina í Trongisvági fyrst og fremst er ein tænasta til teirra kundar í Suðuroy.

Reyni Service og Auto Service umboða bilmerkini: Toyota, Lexus, Iveco, Opel, Peugeot, Nissan og Saab.

Jákup Midjord er 37 ára gamal. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Mogens Petersen og hevur arbeitt har í tilsamans 17 ár, til hann nú keypti fyritøkuna sum umfatar olju- og bensinsølu, handil og bilverkstað, bæði mekaniskt og skaða- og lakkeringsverkstað fyri øll bilmerkir.

Á Shellstøðini í Trongisvági starvast tilsamans tíggju fólk.




*Reyni Service og Auto Service gjørt samstarvsavtalu við Shellstøðina í Trongisvági um eftirlit og smærri umvælingar av teirra bilmerkjum í Suðuroy*

# Rover-navnið selt til Ford




*BMW hava selt rættindini til navnið Rover til Ford, hóast kinesiski bilgiganturin, Shanghai Automotive Industry Corporation (SAIC) herfyri keypti ensku MG-Rover verksmiðjuna*

BMW hava selt rættindini til navnið Rover til Ford, hóast kinesiski bilgiganturin, Shanghai Automotive Industry Corporation (SAIC) herfyri keypti ensku MG-Rover verksmiðjuna.

Rover er eitt yvir 100 ára gamalt bilmerki við langari enskari tradition.

Ford hava síðan 2000, tá BMW seldu Land Rover til Ford, havt forkeypsrættin til Rover-navnið.

Hvussu nógv Ford hava latið fyri Rover navnið verður ikki upplýst, men Shanghai Automotive Industrial Corporation bjóðaðu 16,3 milliónir (evro) og fingu tað tó ikki.

# Jeep Commander ársins 4x4

Eftir royndarkoyring í Wales í eina viku hava enskir motorjournalistar og off-road blaðið "4X4", ið er eitt av størstu bløðum innan sítt øki á enskum, kosið Jeep Commander sum ársins 4x4.

Av 50 møguligum stigum fekk Jeep Commander 39 stig. Ein orsøk til at Jeep Commander fekk so nógv stig, var tað framkomna Quadra-Drive II systemið, verður sagt frá domsnevndini.



*Enskir motorjournalistar og off-road blaðið "4X4" hava kosið Jeep Commander sum ársins 4x4*

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Pláturverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo